# Dráttur bukaði TB

**TB er framvegis á odda í meistaradeildini hjá kvinnum, men Mjølnir bjóðar av álvara av**

FLOGBÓLTUR
*Hermann Mortensen*

Tey flestu hava spátt, at kappingin um gullmerkini, í meistaradeildini hjá kvinnum, verður ein uppgerð millum TB og Mjølnir, men Dráttur kann ikki avskrivast enn.

### Sett í Klaksvík

Tað vóru tríggir dystir á skránni í meistaradeildini hjá kvinnum hetta vikuskiftið.

Leygardagin hevði oddaliðið TB vitjan av verandi meistaranum ÍF. Tvørakvinnur vóru sera avgjørdar og tær gjørdu skjótt av og vunnu ein sera greiðan 3-0 sigur. ÍF megnaði ikki at geva TB nakra mótstøðu og tvørakvinnur vunnu við settúrslitinum 25-16 25-19 og 25-14.

Í Klaksvík spældu Mjølnir og Dráttur. Seinast liðini møttust var í finaluni í Mjølnir-kappingini, ta ferðina vann Dráttur.

Fyri bæði liðini var kravið ein sigur, um FM vónirnar skuldu gerðast veruleikið.

Mjølnir kann framvegis gerðast meistarar, men so skuldi dysturin ímóti Drátti vinnast og helst uttan at tapa eitt einasta sett, tí settmunurin kann gerðast avgerandi fyri, hvør verður FM-vinnari. Sum støðan er í løtuni hevur TB ein betri settmun enn Mjølnir.

Dráttur hevði hinvegin eisini sítt at spæla um, tí hetta var helst seinasti møguleikin hjá liðinum, at taka oddaliðini aftur, tí fjarstøðan upp til oddin vildi gerðast ov stór, um liðið ikki vann á Mjølni.

Sjálvur dysturin var sera góður, liðini stríddist væl og bæði liðini spældu sera gott kombinatiónsspæl. Mjølnir legði væl út og tær vunnu eisini fyrsta sett 25-17. Annað sett var javnari, liðini fylgdust væl, men tær úr Mjølnir vóru drúgvari og vunnu settið 25-21. Triðja og fjórða sett vóru sera spennandi og jøvn. Dráttur hevði marginalarnir á sínari síðu í triðja setti og vann settið 26-24. Fjórða sett var líka spennandi sum triðja, men hesaferð var tað Mjølnir, sum var omaná og tær vunnu settið 25-23 og harvið dystin 3-1.

### Dyst á TB

Sunnudagin skuldi Dráttur aftur í eldin, hesaferð var mótstøðuliðið TB. TB kom vestur í Vágar við einum sigri í skjáttuni, meðan


*Dráttur tók alt á bóli, tá tær um vikuskiftið vunnu tryggan sigur á TB*

Dráttur hevði verið úti fyri einum tapi dagin fyri í Klaksvík. Tvørakvinnur vóru klárir favorittar, men lat tað verða sagt beinanvegin, tað livdi TB ikki upp til.

Dráttur vann ein greiðan sigur. Úrslitið gjørdist 3-0 til heimaliðið, við settúrslitinum 25-21 25-19 og 26-24. Dráttur var klárt omaná í øllum trimum settunum og TB megnaði ongantíð at trýsta tær úr Drátti, so sigurin var fult uppiborin.

Sigurin merkir, at nú er av álvara spenningur komin í meistaradeildina hjá kvinnum. Fyriuttan TB og Mjølnir, so hevur Dráttur framvegis en lítlan møguleika, at spæla um gullið, men tað verður alt annað enn lætt.

Støðan í meistaradeildini er tann, at TB framvegis er á odda í meistaradeildini við 14 stigum fyri 14 dystir. Mjølnir er á øðrum plássi við 12 stigum, men TB hevur tó leikt ein dyst meira enn Mjølnir. Dráttur er á triðja plássi við 10 stigum, fyri 14 dystir.

Næstu ferð TB og Dráttur spæla dyst sínamillum, verður 14. februar í steypafinaluni í flogbólti hjá kvinnum.

## Flogbóltsúrslit

**Meistaradeild kvinnur**
TB-ÍF 3-0 (25-16, 25-19, 25-14)
Mjølnir-Dráttur 3-1 (25-17, 25-21, 24-26, 25-23)
Dráttur-TB 3-0 (25-21, 25-19, 26-24)

**Meistaradeild menn**
Fram-Fleyr 1-3 (27-29, 25-22, 19-25, 22-25)
Mjølnir-SÍ 3-2 (17-25, 16-25, 25-21, 25-18, 15-11)

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 14 | 11 | - | 3 | 36 | 12 | 24 | 14 |
| 2 | Mjølnir | 13 | 10 | - | 3 | 33 | 13 | 20 | 12 |
| 3 | Dráttur | 14 | 7 | - | 7 | 28 | 26 | 2 | 10 |
| 4 | ÍF | 13 | 5 | - | 8 | 18 | 25 | -7 | 6 |
| 5 | KÍF | 12 | 5 | - | 7 | 17 | 28 | -11 | 5 |
| 6 | Fleyr | 12 | 1 | - | 11 | 7 | 35 | -28 | 1 |

**Meistaradeild, menn**

| | | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 10 | 9 | - | 1 | 27 | 6 | 21 | 11 |
| 2 | Mjølnir | 10 | 9 | - | 1 | 27 | 6 | 21 | 11 |
| 3 | SÍ | 11 | 5 | - | 6 | 20 | 20 | 0 | 6 |
| 4 | Fram | 11 | 2 | - | 9 | 9 | 28 | -19 | 2 |
| 5 | Fleyr | 10 | 1 | - | 9 | 5 | 28 | -23 | 2 |

# So vann Fleyr

**Í Klaksík var Mjølnir undir hørðum trýsti, og í Hoyvík fekk Fleyr fyrsta sigurin á árinum**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað hevur gingið meira enn striltið hjá Fleyr hesi seinnu árini. Eftir at eitt lið, sum at kalla einsamalt stóð fyri mansflogbóltinum í felagnum í drúgt áramál, legði árarnar inn fyri tveimum árum síðani, er ein roynd gjørd at lata nýggjar mans taka yvir, men slíkt gerst ikki bara soleiðis uttan víðari.

Úrslitið hevur verið, at annars heiðurskrýnda liðið hevur róta í botninum síðani, og higartil í ár hevði talan bert verið um ósigrar.

Men leygardagin kom vend í. Grannarnir úr Fram hava heldur ikki verið serliga verið serliga sannførandi, og tí var kanska møguleikan hjá Fleyr í hesum dystinum.


*Fleyr vann fyrsta sigurin á árinum, tá teir vitjaðu í Hoyvíkarhøllini leygardagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Og tað gekk eisini at taka av møguleikanum. Fleyr tók tað fyrsta spennandi settið, og hetta tóktist geva somikið av sjálvsálitið, at menninir nú løgdu nógv fyri. Fram royndi at svara aftur, men hetta var til fánýtis, og so kundi Fleyr fegnast um fyrsta sigurin. Kanska ikki ein, sum merkis so væl á talvuni, men sálarliga mundi tað vera eitt stórt skump rætta vegin hjá felagnum, sum ivaleyst hevur vonir um aftur at finna fram á toppin.

### Tungt hjá Mjølni

Seinni dysturin hetta vikuskiftið var í Klaksvík, har Mjølnir tók ímóti SÍ.

Kappingin í ár hevur leingi sæð út til at gerast ein spurningur millum Mjølnir og ÍF, men tað var um reppið, at SÍ skapti ruðuleika í hesum. Tvey tey fyrstu settini tóku gestirnir nevnliga sannførandi, men tað eydnaðist tó heimaliðnum at stríða seg aftur í dystin. Teir tóku eisini tey trý næstu settini, soleiðis at teir enn halda fast í fuglfirðingunum, og nú verður spennandi at síggja, hvussu leikur fer, tá júst tey bæði oddaliðini bresta saman komandi vikuskifti.



# Kollfirðingar skapa spenning

**Við óvæntaðum stórsigri á klaksvíkingum, hava kollfirðingar minkað um munin undan seinasta umfari í 1. deild. Og havnarmenn liggja og lúra nú á triðja plássi**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Undan dystinum hjá føroyska talvfelagnum í Keypmannahavn sunnudagin móti liðnum hjá GM Tiger Hillarp-Persson í Danmark, Brønshøj, skifti yvirritaði orð við svenska stórmeistaran hjá kollfirðinum; Uppá spurningin, hví hann ikki var í Føroyum og hjálpti kollfirðingum í toppdystinun, svaraði hann, at tað helst var nyttuleyst, eftirsum FM helst var avgjørt.

Samstundis segði Tiger, at einasta troyst fyri tap hansara í seinastu viku ímóti Olaf Berg, var, at hann vónaði at Olaf kundi fáa brell og royna seg meira á altjóða talvpallinum. Tað kendist sum hann veruliga unnaði Olafi sigurin. Ein fryntligur maður, svenski stórmeistarin og føroyavinurin, sum eina livur av at telva.

Men skeivur fór hann í metingini um at FM var avgjørt; Kollfirðingar vunnu nevnliga 3-1 á oddaliðnum. Hans Kristian Simonsen hevur í vetur havt misjøvn úrslit, men sunnudagin vann hann á formsterka Òlavi Simonsen.

Rani Nolsøe vann ein góðan sigur á Torbjørn Thomsen á 2. borði, meðan Tummas Martin Anthoniussen, sum undan dystinum hevði 100% skoru, 8 av 8, tapti móti Eyðálvi Johannesen.


*Hans Kristian Simonsenhevur telvað rættiliga óstøðugt í vetur, men hesaferð var eingin ivi, tá hann leikti móti Ólavi Simonsen*

Eitt ómetaliga gott úrslit hjá kollfirðingum, sum nú við stórsigri á toftamonnum í seinasta umfari, samstundis sum tað er neyugt at havnarmenn vinna stórsigur á klaksvíkingum, kunna verða føroyameistarar. Seinasta umfar verður 14. februar, har allar deildirnar telva undir somu lon í Hósvík.

Sí annars úrslit og støður aðrastaðni í blaðnum.

### Endurreistir

Havnarmenn hava vunnið seg fram í oddin við stórsigrum í seinastuni. Men helst verða teir ov stuttir. Ikki tí, teoretiskt kunna teir vinna FM; Tað krevur ein 4-0 sigur á klaksvíkingum, samstundis sum kollfirðingar minst mugu lata tvey stig til toftamenn. Heldur veruleikafjart, men livst so spyrst.

Sunnudagin vunnu havnarmenn 3,5 — 0,5 á sandavágsmonnum. Martin Poulsen leikti sítt fyrsta talv í vetur, eftir drúgva talvferð kring Evropa. Føroyameistarin frá 2003 svíkti ikki ímóti Torkili Nielsen.

Triði dystinum í 1. deild millum Toftir og Hvalvík, endaði 2-2. Andreas Andreasen vann óvæntað á Martini Brekká. Martin hevur havt ein harðan vetur á 1. borði hjá hvalvíkingum. Hinvegin hevur Finnbjørn Zachariassen á 2. borði verið álitið hjá hvalvíkingum.

### Vestmenningar í 1. deild

Sum væntað varð undan kappingarbyrjan, eru vestmenningar í serklassa í 2. deild. Teir hava tryggjað sær fyrsta pláss. Í 3. deild vinnur Havnin 3, meðan hjá unglingunum hevur a-liðið hjá klaksvíkingum verið einaráðandi í ár. Eitt umfar er eftir at leika, og tað er bert í 1. deild, at einki er avgjørt.

### Talvfelagið Føroyar vunnu

Við einum skerdum liði, eydnaðist tað kortini føroyska felagnum í Keypmannahavn at vinna í 5. umfari á sterka liðnum úr Brønshøj. Einar Gausel og John Arni Nilssen vunnu á ávíkavist GM Tiger Hillarp-Persson og GM Carsten Høi, meðan Nikolaj Borge, Flóvin Tór Næs, Eyðun Nolsøe, Carl Eli Nolsøe Samuelsen og Heini Danielsen leiktu javnt. Innskiftarin Arild Rimestad tapti sítt talv á 8. borði.

Ein kærkomin og í roynd og veru óvæntaður sigur, sum merkir, at felagið megnar at halda sær uppi í fremstu donsku deildini. Nú kunnu eyguni vendast móti toppinum, fá stig eru upp til topp 4.

Føroyingar hava vunnið tveir dystir, leikt ein javnan og bert tapt ein dyst í donsku elitudeildini.

Tvey umfør eru eftir at telva, og verða tey leikt vikuskiftið 28/29. februar.

# Heini Olsen IM-norm

34 ára gamli Heini Olsen úr Klaksvík, ognaði sær sunnukvøldið sín fyrsta IM-norm (International Master norm), tá hann vann OSS International í Norra. Heini fekk 6,5 stig av 9 møguligum, og tað var júst kravið til normin.

Tríggir tílíkir normar skulu ognast, fyri at kunna kalla seg altjóða meistari. John Arni Nilssen hevur tveir normar, meðan Flóvin Tór Næs og Heini Olsen hava ein hvør.

Heini hevur veruliga uppiborið normin; Í 1990´unum - tá hann einsamallur myndaði føroyska topptelving - var Heini fleiri ferðir millimetrar frá norminum. Men 2004 varð árið, har fimmfaldaði føroyameistarin (FM 1989, 1991, 1992, 1993 og 1999) fekk sítt altjóða gjøgnumbrot.

Klaksvíkingurin telvaði sera væl og støðugt í Norra. Fýra talv vann hann og leikti fimm javnleikir. Talvið hjá honum frá fimta umfari er við í blaðnum í dag. Eitt gott álopstalv.

**-CENS**



## Talvið hesa vikuna

**Heini Olsen 2255 — Flemming Christenson 2303**
OSS Januar International (5. umf)

**1.Rif3 d5 2.d4 c6 3.c4 e6 4.Fc2 dxc4 5.Fxc4 b5 6.Fc2 Bb7 7.e4 Rid7 8.Be2 a6 9.0—0 c5 10.d5!** (Eitt gott finnuoffur) **10...exd5 11.exd5 Bxd5 12.Rd1 Rigf6 13.Ric3 Bb7 14.Bg5 Fc7 15.Bxf6 Rixf6**


**Støðumynd eftir 15...Rixf6**

**16.Rixb5!** (Heini í essinum! Svartur verður trælabundin hereftir, men hevur tó enn nakrar verjuressursir) **16...axb5 17.Bxb5+ Bc6 18.Re1+ Kd8 19.Rad1+ Kc8 20.Ff5+** (Hevur hvítur nokk fyri riddaran?) **20...Kb8 21.Bxc6 Fxc6 22.Rie5 Fc7??** (Fyrsti veruligu feilur frá norskari síðu. Fc8 var einasti leikur) **23.Rid7+! Ka7 24.Rixf6 Rd8** (um 24...gxf6 25.Rd7 og liðugt) **25.Rxd8 Fxd8 26.Rid5** (Fullkomiliga vunnið hjá hvítum) **26...f6 27.Re4 Bd6 28.Ra4+ Kb8 29.Fd3 Re8 30.Fb3+ 1—0**

## Úrslit og støður

**1. deild - 9. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| Klaksvík | Kollafjørður | 1-3 |
| Ólavur Simonsen | Hans Kristian Simonsen | 0-1 |
| Rani Nolsøe | Torbjørn Thomsen | 1-0 |
| Tummas M. Anthoniussen | Eyðálvur Johannesen | 0-1 |
| Ingolf Gaard | Grettir Djurhuus | 0-1 |
| Toftir | Hvalvík | 2-2 |
| Andreas Andreasen | Martin Brekká | 1-0 |
| Helgi Joensen | Finnbjørn Zachariassen | 0-1 |
| Justinus Hansen | Bergur Magnussen | 0-1 |
| Øssur Hansen | Gunnar Joensen | 1-0 |
| Sandavágur | Havnin | 0,5-3,5 |
| Torkil Nielsen | Martin Poulsen | 0-1 |
| Bernhard Augustinussen | Olaf Berg | 0-1 |
| Sonni Nielsen | Bogi Ziska | 0-1 |
| Jónfinn Thomsen | Herluf Hansen | 0,5-0,5 |

**Støðan, 1. deild**

| | |
|---|---|
| 1. Klaksík | 25,0 |
| 2. Kollafjørður | 23,5 |
| 3. Havnin | 21,5 |
| 4. Hvalvík | 17,0 |
| 5. Toftir | 13,0 |
| 6. Sandavágur | 8,0 |

**Støðan í DK 1. deild**

| | |
|---|---|
| Helsinge | 30,0 |
| Skolerne | 26,0 |
| SK 1968 | 21,5 |
| K41 | 21,5 |
| Brønshøj | 19,5 |
| TF Føroyar | 19,0 |
| Nørresundby | 12,0 |
| Århus | 10,5 |

**Støðan, 2. deild - 9. umf.**

| | |
|---|---|
| 1. VT | 22,0 |
| 2. HT2 | 16,0 |
| 3. KT2 | 12,5 |
| 4. KTF2 | 12,0 |
| 5. VT2 | 9,5 |

**Støðan, unglingar - 10. umf.**

| | |
|---|---|
| 1. KTFa | 30,0 |
| 2. HTa | 23,5 |
| 3. GT | 23,0 |
| 4. KTFb | 21,0 |
| 5. VTa | 20,5 |
| 6. ST | 19,0 |
| 7. TT | 17,5 |
| 8. HTb | 15,0 |
| 9. MT | 12,5 |
| 10. Rókur | 7,5 |
| 11. VTb | 0,5 |

**Støðan, 3. deild - 13. umf.**

| | |
|---|---|
| 1. HT3 | 36,5 |
| 2. GT | 29,0 |
| 3. HT4 | 27,0 |
| 4. ST2 | 25,5 |
| 5. Rókur | 16,5 |
| 6. VT3 | 12,5 |
| 7. MT | 9,0 |